Nr. 128 - 8. juli 2009

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði, seinnapartin minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fleyr til gul av norði og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 13 og 16 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og landnyrðingi og okkurt ælið, men eisini sólglottar. Hitin millum 13 og 17 stig.

*Juni var bæði turrur í lýggjur. Avfallið var bert 17mm ímóti 66mm, sum er miðal yvir 30 ár. Miðalhitin var 9,9°c ímóti 9.0°c yvir 30 ár.*

# Kópurin hvíldi seg á Janusi

**Tvøramaðurin Janus Mortensen fekk ein heldur óvanligan leiklut, tá hann var á trygdarvenjing í Norðsjónum**

FRÁLANDAVINNA
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Teir, sum sigla við frálandaskipum í Norðsjónum, síggja javnan kóp, og tað er ikki óvanligt, at kópurin brúkar kúlustevnið á skipunum til at hvíla seg á. Men Janus Mortensen, sum er maskinmeistari á danska frálandaskipinum "Esvagt Carina", fekk herfyri at sanna, at kópurin dugir at gera sær dælt av teimum møguleikum, sum nú eina ferð eru til taks.

Saman við tveimum øðrum av manninginí var Janus Mortensen farin á venjingarferð við einum báti hjá skipinum. Brádliga kom ein kópur til teirra. Tað var týðiligt, at kópurin hevði brúk fyri hvíld, og hann gjørdi ikki mætari enn at leggja seg oman á Janus, sum fleyt í vatnskorpuni í sínum lívbúna. Eftir myndini, sum ein av skipsfeløgunum hjá Janusi tók, tykjast bæði Janus og kópurin njóta ta sjáldsomu løtuna.

Á Esvagt verður sagt, at hetta er fyrstu ferð, at tey hava hoyrt, at ein kópur hevur brúkt flótandi mann sum hvíldarstað.

Janus Mortensen sigur við Sosialin, at kópurin royndi eisini at sleppa upp í bátin hjá teimum. Hann vísir á, at tilburðurin var miðskeiðis millum Noreg og Skotland, og at har er ikki nógv hjá einum kópi at hvíla seg á.

Tveir aðrir føroyingar eru við "Esvagt Carina". Mads Olsen, sum er ættaður úr Skopun, er skipari, og John Andrew Johannesen av Tvøroyri er yvirstýrimaður.



*Tað er líkt til, at bæði Janus Mortensen og kópurin nutu løtuna*
*Mynd: Esvagt*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 15 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 19 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 20 |
| Oslo | - |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 25 |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 26 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 31 |
| Athen | 30 |
| Malta | 33 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 39 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 13 |
| New York | 27 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | -- |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 30 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



**Síðstu nátt:**
Eitt hátrýst, 1022 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum fer spakuliga í landsynning. Eitt lágtrýst, 997 hPa. yvir Suður-Noreg stendur mestsum í stað og dýpist.

**Komandi nátt:**
Hátrýstið vestan fyri Føroyar stendur mestsum í stað. Lágtrýstið yvir Suður-Noreg stendur eisini í stað, men viknar nakað.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 06/07 kl. 06⁰⁰ – 07/07 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,6°
Minsti hiti máldur í juli: +0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 06/07 kl. 06⁰⁰ – 07/07 06⁰⁰.
Avfallið higartil í juli: 2 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

7. juli — Fullmáni/
Mánin longst frá jørini
15. juli — Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8. juli | 08:21 | 20:41 | 07:21 | 19:41 | 07:36 | 19:56 | 10:21 | 22:41 | 11:21 | 23:41 | 06:36 | 18:56 | 05:36 | 17:56 | 08:36 | 20:56 | 09:36 | 21:56 | 08:06 | 20:26 | 09:21 | 21:41 |
| 9. juli | 09:01 | 21:19 | 08:01 | 20:19 | 08:16 | 20:34 | 11:01 | 23:19 | - | 12:01 | 07:16 | 19:34 | 06:16 | 18:34 | 09:16 | 21:34 | 10:16 | 22:34 | 08:46 | 21:04 | 10:01 | 22:19 |
| 10. juli | 09:38 | 21:56 | 08:38 | 20:56 | 08:53 | 21:11 | 11:38 | 23:56 | 00:19 | 12:38 | 07:53 | 20:11 | 06:53 | 19:11 | 09:53 | 22:11 | 10:53 | 23:11 | 09:23 | 21:41 | 10:38 | 22:56 |
| 11. juli | 10:15 | 22:33 | 09:15 | 21:33 | 09:30 | 21:48 | - | 12:15 | 00:56 | 13:15 | 08:30 | 20:48 | 07:30 | 19:48 | 10:30 | 22:48 | 11:30 | 23:48 | 10:00 | 22:18 | 11:15 | 23:33 |
| 12. juli | 10:51 | 23:09 | 09:51 | 22:09 | 10:06 | 22:24 | 00:33 | 12:51 | 01:33 | 13:51 | 09:06 | 21:24 | 08:06 | 20:24 | 11:06 | 23:24 | - | 12:06 | 10:36 | 22:54 | 11:51 | - |